**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0664**
**Tíðarskeið 30/08-06/09-2006**

---

**Fólk frá FRS.:** Hjálmar Hátún, Regin Kristiansen og Bertrand (ein fransmaður).

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og termistorketan.

**Um túrin:** Vit fóru út mikudagin 31/08 kl.1810. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir.
Frá skurði N sigldu vit vestur á støð V1 á skurði V, vit tóku skurðin frá landgrunninum og út á Føroyabanka. Tá hesin skurðurin varð liðugur, sigldu vit inn í Bankarennuna og tóku ein mátara upp (AQUALAB). Vit tóku eina CTD støð á somu positión, sum mátarin lá. Hetta gekst alt, sum tað skuldi
Haðani varð farið á skurð S og tóku vit hendan skurðin av Munkagrunninum og móti Hetlandi.
Siglt varð so norður á støð E8 og tóku vit hendan skurðin frá markinum og inn ímóti Nólsoynni.
Tá hetta var liðugt, tóku vit eina støð við termistorketuni. Vit byrjaðu eystur úr Sandoy og tovaðu inn móti landi.
Alt riggaði, sum tað skuldi, og alt gekst væl Veðrið var stak gott hendan túrin.
Vit vóru aftur á Havnini týsdagin 5/9 kl. 1600.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 52 støðir og saltprøvar á 52. Við WP2 glúpinum tóku vit 51 støðir.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

**Viðmerkingar:**

12-09-2006 ____________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0664